

## Mærsk finnur meiri olju

Mærsk Olje og Gas hevur gjørt eitt gass- og kondensatfund í vestara partinum av Norðsjónum. Tað boðar Energistyrelsen frá. Fundið er gjørt í royndarboringini Luke-1X í loyvi 8/06. Kondensat er løtt olja. – Feløgini í loyvinum skulu nú meta um úrslitini frá royndarboringini nærri og síðani leggja eina ætlan fyri framhaldandi kanningum, ið skulu gera av, um gass og kondensat finst í rakstrarverdum nø.gdum, verður sagt í fráboðanini. Í loyvi 8/06 er feløgini Mærsk við 36,7%, Shell hevur 43,3% og Nordsøfonden eigur seinastu 20%. Tað skrivar boersen.dk eftir Nyhedsbureauet Direkt.

# Avreiða tann størsta inntøk

**Tað eru tey, sum halda, at tað at gagnnýta uppisjóvarfiskin er tann største inntøkumøguleikin, sum tað føroyska samfelagið hevur í løtuni. Kortini vórðu 72,3 prosent av tí, sum tey føroysku uppisjóvarskipini fiskaðu í fjør, avreidd í øðrum londum til virkingar har**









FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann føroyski uppisjóvarflotin hevur onkuntíð verið størri, enn hann er nú, og hann hevur eisini onkuntíð havt rúmari ræsur, enn hann hevur í dag. Minkandi kvotu hava gjørt, at nøgdirnar eru minkaðar, og tað hevur noytt vinnuna at leggja seg eftir at hava færri, men størri og effektivari skip fyri at fáa meiri burturúr. Úrslitið er, at í dag kunnu uppisjóvarskipini næstan teljast á einari hond.

Men teir skerdu veiðimøguleikarnir hava eisini havt við sær, at prísurin á uppisjóvarfiskinum er hækkaður, og tí hava uppisjóvarskipini verið millum teirra, sum hava havt tað besta fíggjarliga úrslitið at vísa á tey seinnu árini. Spurningurin er so, um hesin parturin av veiðitilfeinginum hjá samfelagnum eisini gevur samfelagsbúskapinum tað best møguliga avkastið.

### 72% av nøgdini

Í 2009 avreiddu tey føroysku uppisjóvarskipini 157.354 tons av sild, svartkjafti og makreli. Tøl hjá Fiskiveiðieftirlitinum vísa, at av hesum avreiddu skipini 43.519 tons í Føroyum, meðan hini 113.835 tonsini vórðu avreidd uttanlands.

Skipini avreiddu 84.944 tons av sild. Av hesum vórðu 15.474 tons avreidd í Føroyum, meðan 69.470 tons vórðu avreidd í øðrum londum. Tað vil siga, at skipini avreiddu 81,8 prosent av sildini uttanlands og 18,2 prosent í Føroyum.

Av svartkjaftinum kom heldur meiri upp á land í Føroyum. Av teimum 58.348 tonsunum, sum skipini avreiddu, vórðu 28.000 tons løgd upp í Føroyum, meðan útlendsk virkir fingu 30.300 tons. Sostatt var býtið, at 51,9 prosent av svartkjaftinum vórðu avreidd uttanlands og 48,1 prosent í Føroyum.

Makrelurin er ein søga fyri seg, tí ølla veiðan, 14.061 tons, varð avreidd uttan fyri Føroyar.

Leggja vit tølini saman, avreiddu uppisjóvarskipini 72,3 prosent av veiðini uttanlands. Hini 27,7 prosentini avreiddu tey í Føroyum.

### 81 prosent av virðinum

Siga vit, at meðalprísurin á sildini var 2,50 krónur pr. kilo í fjør, avreiddu tey føroysku uppisjóvarskipini sild fyri 212,4 milliónir krónur í 2009. Virðið á sildini, sum bleiv landað í Føroyum, var 38,7 milliónir krónur, meðan skipini avreiddu sild fyri 173,7 milliónir krónur í útlendskum havnum. Við øðrum orðum var virðið á avreiðingunum uttanlands 81,8 prosent av tí samlaða avreiðingarvirðinum. Tann føroyski parturin var 18,2 prosent.

Seta við meðalprísin á svartkjaftinum til 1,50 krónur pr. kilo í fjør, avreiddu skipini svartkjaft fyri 87,5 milliónir krónur. Fyri tað, sum bleiv landað í Føroyum, var avreiðingarvirðið 42,1 milliónir krónur, og uttanlands avreiddu